# Allir fýra fírarnir ávirkaðir av rúsdrekka




**Vestmanna:** Ógreitt er enn, hvønn veg bilurin kom koyrandi – annaðhvørt hann var á veg til ella úr Vestmanna.

Greitt er kortini, at ein kona boðaði løgregluni frá, at ein bilur var farin út av vegnum í svinginum í Gassadali omanfyri Vestmanna sunnukvøldið.

Løgreglan fekk fráboðan um hesa hendingina kl. 19:18, og kom á staðið. Har varð alt fyri eitt staðfestur ein illgruni um, at allir fýra menninir í bilinum vóru ávirkaðir av rúsdrekka.

Tann stóri spurningurin var, hvør teirra sum hevði koyrt bilin, tá hann fór út av vegnum. Tí gjørdi løgreglan ikki mætari enn at fáa tikið blóðroynd av øllum fýra unglingunum, sum vóru í bilinum.

**sb.**

## Drongur breyt framtenn

**Vestmanna:** Um náttúrðatíð sunnukvøldið hendi eitt minni ferðsluóhapp í Vestmanna.

Ein drongur kom á súkklu síni koyrandi í vinstru síðu eftir Heygagøtu, við einum øðrum dreingi uppiá.

Ein bilur kom koyrandi móti teimum, og soleiðis hendi óhappið. Annar drongurin breyt tvær framtenn.

Súkklan oyðilegðist, men bilurin fekk bert smávegis skaða.

**sb.**

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 33, 2005
www.kaupthing.fo

# Nær fær oljuprísurin týdning?

MARKNAÐARRÁK

Í farnu viku setti oljuprísurin enn einaferð met, tá hann hækkaði heili 8% til stívliga 66 dollarar fyri tunnuna (Brent). Síðan mai mánaða er hann hækkaður umleið 40%. Orsøkirnar til høga oljuprísin hava vit fleiri ferðir áður umrøtt her. Eftirspurningurin er sera høgur, framleiðaralondini framleiða næstan alt tey megna, og reinsivirkini eru vorðin ein sannur fløskuhálsur. Tað løgna á fíggjarmarknaðunum er, at hvørki láns- ella partabrøv hava latið nakað serligt við seg koma. Eftir at búskapirnir kláraðu ein prís um 50 dollarar síðsta heyst, hava marknaðirnir tikið tað meiri róligt, tá hann síðani fleiri ferðir hevur verið um 50. Men nú er hann oman fyri 65, og marknaðirnir kunnu neyvan látast sum einki, um hann verður oman fyri 60 í fleiri vikur. Um so verður, skal líkasælan í summar óivað takast aftur, og so lækka partabrøv, meðan lánsbrøvini hækka.

### Lánsbrævarentur støðugar

Hækkandi lánsbrævarenturnar, sum hava verið síðan juni, steðgaðu á í farnu viku. 10-ára danska rentan er nú 3,29%. Lánsbrævarenturnar eru nú á einum týdningarmiklum vegamóti, og gongdin hendan mánaðin kann avgera, hvussu rákið verður komandi 2 mánaðirnar.

### Partabrøv

Á norðurlendska marknaðinum vóru tað serliga oljufeløgini ið hækkaðu í virði í farnu viku; hetta orsaka av høga oljuprísinum. Danske Bank kunngjørdi góðan roknskap og uppmetti útlitini. Varligu metingarnar og lági prísurin á partabrævinum í mun til aðrar bankar, ger partabrævið áhugavert at keypa á verðandi stigi.

### Hesa vikuna

Tað verður áhugavert at vita, um hetta verður vikan, tá fíggjarmarknaðirnir fara at leggja merki til oljuprísin. Tað koma fá týdningarmikil lyklatøl, prísvøkstur í USA og Evropa, umframt vinnuálitistøl úr USA. Hesi verða øll fyri juli mánaða, tá oljuprísurin ikki var so nógv broyttur í mun til juni, so hann ávirkar neyvan hesi tølini so nógv, sum august-tølini fara.







**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 598,12 | -0,9% | ↓ |
| JPY | 5,47 | 1,3% | ↑ |
| GBP | 1.086,13 | 1,1% | ↑ |
| NOK | 94,57 | 0,2% | ↑ |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 103,88 | 0,1% | ↑ |
| Evru Lánsbrøv | 174,53 | -0,2% | ↓ |
| Norrøn Partabrøv | 99,66 | 1,4% | ↑ |
| Altjóða Vøkstur | 66,45 | 0,8% | ↑ |

Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.